# Rýmdi frá verksmiðjum og luftdálking

**HONDBÓLTUR** Barbara Brauer sigur í viðtalu við heimasíðuna hjá Neistanum, at hon valdi friðsæluna fram um verksmiðjur og dálkaða luft, tá hon skifti til Neistan

Uni Holm Johannesen

Barbara Brauer hevur verið stóra stjørnan í bestu kvinnudeildini í hesum kappingarárinum.

Serbin hevur við sínum dundrandi skotum syrgt fyri, at Neistin er væl við í stríðnum um finalupláss.

Brauer skifti til Neistan undan kappingarárinum í ár. Hon visti lítið og einki um Føroyar, tá hon skrivaði undir við føroyska høvuðsstaðarfelagið.

– Eg veit av royndum, at tað tekur tríggjar mánaðir at finna seg til rættis í nýggjum stað. Mær dámar ótrúliga væl í Føroyum, og eg eri sera fegin um at tók hesa avgerðina. Mær dámar væl føroysku náttúruna, síggja sjógvin og skipini, og serliga ljósið í vetrarhálvuni og merkja reinu luftina, sigur hon við Neistin.fo.

Brauer spældi í Týsklandi, áðrenn hon vendi nøsini hendavegin. Hóast Markranstadt Piranas vildi leingja sáttmálan við hana, so rýmdi hon frá verksmiðjum og týsku dálkaðu luftini.

Hon letur væl at føroyskum hondbóltsspælarum.

– Áðrenn leiðin gekk til Føroya fekk eg eitt sindur at vita um føroyskan kvinnuhondbólt, men eg má sanna, at støðið er hægri, enn eg fekk at vita frá byrjan, sigur Barbara Brauer.

Lesið alla samrøðuna við serbiska spælaran á neistin.fo.



*Klaksvíkingar vunnu greitt í Havn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# ÍF er fremst

**FLOGBÓLTUR** Fuglfirðingar vunnu oddadystin á SÍ á útivølli í gjár. Úrslitið var 3-0. ÍF er nú fremst í Eik-liguni.

Uni Holm Johannesen

Munurin var ikki stórur, hóast ÍF var við yvirlutan í øllum settunum.

Settúrslitini vóru 20-25, 23-25 og 21-25.

ÍF lyftir seg við sigrinum upp um øll hini liðini á stigatalvuni. Fuglfirðingar eru fremstir við 12 stigum, og SÍ er nummar tvey við 10 stigum.

Mjølnir vann greitt, tá liðið vitjaði Fleyr í gjár. Úrslitið var 3-0 til klaksvíkingar, og settúrslitini vóru 17-25, 22-25 og 19-25.

*uni@sosialurin.fo*

# Hjalgrím Elttør skiftir til KÍ

**FÓTBÓLTUR** Hjalgrím Elttør, sum seinasta kappingarár spældi við B36, spælir við KÍ í 2011

Uni Holm Johannesen

Hjalgrím Elttør og KÍ skrivaðu undir sáttmálan mikukvøldið.

Klaksvíkingurin hevur verið millum stóru profilarnar í føroysku landskappingini seinastu árini. Hann átti stóran leiklut í føroyameistaraheitinum hjá NSÍ í 2007, og hann hevur eisini staðið seg væl hjá B36 í ár, hóast árstalsfelagið ikki rakk longri upp enn eitt sætta pláss á stigatalvuni.

Hjalgrím Elttør hevur aftur vunnið sær pláss í landsliðshópinum, og hann var millum teir fyrstu ellivu í landsdystinum móti Norðurírlandi og Skotlandi.

# Kurt skal spæla móti Rubeksen

**FÓTBÓLTUR** Kurt Mørkøre er venjari hjá Averøykameratene, sum spælir í fjórðbestu deildini í Noregi

Uni Holm Johannesen

Volda, sum júst hevur knýtt Hendrik Rubeksen og Thomas Hans Rubeksen at hópinum, spælir eisini í fjórðbestu deildini.

Kurt Mørkøre, sum tók við venjarastarvinum í farna mánaða, skal tískil royna at leggja fót fyri føroyingunum í stríðnum um uppflyting.

*uni@sosialurin.fo*

**Leygardagin, 27. november:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | ÍF – TB | Kambsdalur | Klokkan 13.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | SÍ – TB | Sørvágur | Klokkan 13.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | VB – Tjaldur | Vágur | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | StíF – Kyndil | Skála | Klokkan 17.00 | Kvinnur |

**Sunndagin, 28. november:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | ÍF – Mjølnir | Kambsdalur | Klokkan 15.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | StíF – Kyndil | Skála | Klokkan 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | KÍF – H71 | Kollafjørður | Klokkan 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | VÍF – Team Kl. | Vestmanna | Klokkan 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | VÍF – Tjaldur | Vestmanna | Klokkan 18.00 | Kvinnur |

**Eik-ligan** *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 7 | 6 | 1 | 18 | 5 | 13 | 12 |
| 2 | SÍ | 7 | 5 | 2 | 17 | 7 | 10 | 10 |
| 3 | Mjølnir | 7 | 4 | 3 | 13 | 10 | 3 | 8 |
| 4 | Fleyr | 8 | 3 | 5 | 11 | 17 | -6 | 6 |
| 5 | TB | 7 | 0 | 7 | 1 | 21 | -20 | 0 |